# ítróttur

Nr. 45 • hósdagur • 6. mars 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

## Fyrstu meistararnir



*Dreingir 10 hjá Kyndli gjørdust sannførandi føroyameistarar í síni deild. Standandi frá vinstru eru tað Jógvan Nolsøe, Niels Juel Nolsøe, Sigurð Simonsen og Samson Helmsdal. Húkandi f.v. Tróndur Jensen, Rene Joensen, Bergur Joenen og Høgni Klein Olsen*

Dreingir 10 ár hjá Kyndli gjørdust fyrstu føroyameistararnir í hondbólti hetta kappingarárið.

Og ikki kann sigast annað enn,a t hetta varð gjørt við maner. Bert ta einu ferðina mátti liðið fara av vøllinum uttan fulla úrtøku, tá teir í seinasta dystinum á árinum leiktu javnt móti Neistanum. Og nú kappingin er liðug, gjørdist munurin niður til næsta liðið upp á heili átta stig. Sum tað sæst á myndini, so høvdu teir allir rigga seg til, tá besta mansliðið hjá Kyndli leikti steypafinaluna móti StÍF, men teir lata tó eina heilsan til Føroya Banka, sum í ár er høvuðsstuðul hjá øllum liðunum hjá Kyndli í yngru deildunum.

Næsta liðið var annars Neistin. Stjørnan gjørdist nummar trý og StÍF nummar fýra.

## Millíónirnar streyma inn

Meðan flest øll onnur donsk feløg hava trupult við at fáa fíggjarliga partin at mala so nøkunlunda runt, so hevur felagið hjá Toda Jónsson, FCK, als einki at hugsa um í so máta.

Seinast í februar mánaði almannakunngjørdi felagið ein hálvársroknskap, sum sýndi eitt yvirskot upp á 24,5 mió.kr., tá keyp og søla av leikarum ikki vórðu tikin við. Júst søla av leikarum tykist annars vera einasti hátturin, sum onnur donsk feløg kunnu fáa raksturin at hanga saman uppá, men hetta er so ikki neyðugt hjá Østergaard og teimum. Annars hevði støðan hjá Toda Jónsson helst verið nakað øðrvísi.

**-jm**

## Kanna eyguni

Tað er ikki altíð so lætt hjá venjarum at finna útav, hví leikarar teirra ikki gera akkurát tað, sum teir hava fingið boð um.

Í Esbjerg ganga tey nú nýggjar leiðir í at finna útav heusm. Felagið fer nevnliga at senda allar leikararnar í fyrstaliðshópinum til optikara, har teir skulu royna eygu síni. Tað verður nevnliga sagt, at vánalig sjóns- og balansuevni kunnu vera orsøkin til, at fótbóltsleikarar av og á raka bóltarnar fullkomuliga skeivt, eins og teir ikki altíð standa har, sum venjarin vil hava teir at standa.

Elituvenjarin hjá felagnum, Karsten Sejerup sigur annars sambært bold.dk, at sjónsroyndin framyvir verður fastur táttur av teimum fysisku royndunum í felagnum.

**-jm**

## Danska elituendaspælið

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HIK Aalborg | 7 | 7 - 0 | 21 | 8 | 13 | 14 |
| 2 | Holte IF | 9 | 5 - 4 | 21 | 15 | 6 | 10 |
| 3 | Skovbakken Volley | 7 | 5 - 2 | 16 | 11 | 5 | 10 |
| 4 | DHG Odense | 7 | 3 - 4 | 13 | 15 | -2 | 6 |
| 5 | Marienlyst | 8 | 3 - 5 | 16 | 19 | -3 | 6 |
| 6 | Gentofte Volley | 8 | 0 - 8 | 5 | 24 | -19 | 0 |

## Holte hongur í

**Týskvøldið vann føroyska útisetaefelagið heimadys móti Marienlyst, og liggja teir sostatt framvegis til at koma í hálvfinaluna**

FLOGBÓLTSÚTISETI
*Jákup Mørk*

Týskvøldið leikti Holte IF sín næst seinasta dyst í danska elituendaspælinum. Mótstøðuliðið var Gentofte Volley, sum enn ikki hevur fingið nakað stig í endaspælinum, og tað fingu teir so heldur ikki hesaferð.

Holte vann nevnliga dystin 3-1, men hóast trygga sigurin, so skerst ikki burtur, at teir í Holte iðra seg eitt lítið sindur um, at hann ikki gjørdist enn tryggari. Við einum 3-0 sigri kundi Holte nevnliag tryggja sær luttøku í fjórðingsfinalunum, men nú kunnu teir framvegis snávað, tó at teir enn hava lagnuna í egnum hondum. Sostatt skulu teir bert fáa eittans sett í seinasta dystinum móti DHG Odense, fyri at koma víðari.

Um dystin týskvøldið er annars at siga, at Holte ikki hevði teir stóru trupulleikarnar av Gentofte. Tey bæði fyrstu settini vórðu vunnin rættiliga sannførandi, men tá teir so settu ferðina niður í triðja, sluppu mótstøðumenninir við í dystin. Úrslitið av hesum gjørdist eisini, at Gentofte vann triðja settið, og tó at Holte aftur vann fjórða trygt, so kann missurin av hesum eina settinum altso vísa seg at gerast tungur.

Seinasti dysturin hjá Holte verður annan leygardag, tá teir vitja í Odense. Fyrri dysturin millum liðini í endaspælinum endaði við 3-0 sigri til Holte, so tað skuldi ikki verið heilt ógjørligt hjá teimum at vinna settið, sum kann tryggja teimum víðari luttøkuna.


# Kom og royn tann nýggja Citroën Berlingo!



Citroën Berlingo 2.0HDI Multispace
184.000,-

Citroën Berlingo 1.6i Multispace
168.000,-

- Hill yvir førara
- Rúm í dúrkinum aftan
- 2. skjótihurðar
- 624 litrar viðførisrúm
  - 2800 litrar um baksetrini verða løgd niður

*(1.4i og 1.9d fáast eisini)*
*Fleiri á goymslu*
*Fæst eisini sum vørubilur*

*Vælkomin til*

CITROËN
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Sosialurin 311820

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Kunngerð

Tað verður við hesum gjørt kunnugt, at býráðið á fundi 20. februar 2003 samtykti, at vegurin í útstykkingini hjá p.f. Guttesen og Staksberg eystan fyri Løgmannabreyt fær navnið:

***Maritugøta***

SNARSKIVAN

Minst til bilbeltið!

Helvtin av teimum, sum hava látið lív í ferðsluvanlukkum og ikki vóru í bilbelti, høvdu verið á lívi, um tey nýttu bilbeltið.



Søkt verður eftir

## LÆRLINGI Í SALTANGARÁ

at byrja sum skjótast

**Læran umfatar:** Samskifti við viðskiftafólk, sølu og annað fyrifallandi handilsarbeiði

**Vit vænta:** at tú ert sjálvstøðug/ur, arbeiðssom/samur, røkin, fyrikomandi og hevur hug og hegni til at veita kundum okkara eina góða tænastu.

Tað er ein treyt, at tú hevur FHS.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 21. mars 2003

Sendast til:

P/F Hjá Fróða

Yviri við Strond 3 · Postboks 1336 · FO-110 Tórshavn
tel 310808 · fax 314676 · frode@post.olivant.fo · www.hjafroda.fo

Team 85 358000

Sosialurin

## Heimarøktin Norðstreymoy

### Eldrasambýlið í Vestmanna

Vegna uppskúlan hjá okkara starvsfólkum verður søkt eftir náttarvakt at arbeiða 20 tímar um vikuna í tíðini 15.04.03-01.05.04.

### Heimarøktin í Kvívík

Søkt verður somuleiðis eftir heimahjálpara at arbeiða í Kvívík 20 tímar um vikuna í tíðini 01.04.03-31.03.04.

Til bæði størvini er tað ynskiligt at viðkomandi hevur útbúgving ella royndir og kunnleika innan eldrarøkt.

Um tú ynskir at vita meira um størvini, ert tú vælkomin at ringja til Sonju Klein, økisleiðara tlf. 333249.

Størvini vera lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

**Heimarøktin Vágar/Norðstreymoy**
Heilsumiðstøðin
370 Miðvágur

**Umsóknarfreist: 21.03.03.**